LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

VOLVO 144 TIL SØLU
Vælhildin Volvo 144 frá nov. 1971 til sølu, bert tveir eigarar, koyrt km. 87.800. Til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 314018/213727

OPEL VECTRA TIL SØLU
1.8 árg. 2000, koyrt 41.000 km, sera vælhildin. Møguliga kann annar bilur ganga inn í keypið.
Tlf. 221479

FORD MONDEO TIL SØLU
Ford Mondeo 1.8 TD árg. 8/98, bilurin er svartur, sportfelgur og nógva eykaútgerð. Økonomiskur og í góðum standi. Prísur 109.000 kr.
Tlf. 581442/314198

17" SPORTFELGUR
til sølu, 5 hol, passa til Peugeot o.a. bilar. Nýprísur 9.500 kr. nú 4.000 kr.
Tlf. 282511/424611

TIL SØLU
Sportfelgur 225/45-17" 5 hol. Passa til VW Passat og Audi o.a. bilar. Nýprísur 9.000 kr. nú 3.500 kr.
Tlf. 424611/282511

BENSINTANGI
til Opel Kadett 83 model 1300 motor ynskist.
Tlf. 421744

BOYLAR
Boylar til takboks til sølu. Passa m.a. til Ford/Mondeo frá 2002.
Tlf. 373922/227522

4 NÝGGJ PÍKADEKK
(1 vetur) 185/65-R15 á felgum, 5 boltar. Felgurnar hava verið undir Skoda Octavia. Prísur 4.000 kr.
Tlf. 217198/457198

TOYOTA AVENSIS
2.0 TD, gráur diesel, árg. 99, sýnaður í juni, koyrt 108.000 km til sølu.
Tlf. 441642

PEUGEOT 306
hvítur, árg. 97, koyrt 82.288 km, sýnaður í mai 2003 til sølu.
Tlf. 441642

OPEL CORSA TIL SØLU
Opel Corsa Sport 1.4. Árg. 1996, koyrt 91.000 km. Nýsýnaður, ongar krossar! Nýggj píkadekk fylgja við.
Tlf. 310606 ella 510606

MAZDA 626 TD
Hatch Back, árg. 98, el-rútar aftan og framman, el-spegl.
Tlf. 373985

BMW 320i
árg. 85 til sølu fyri 25.000 kr. við øllum anlegginum.
Tlf. 256944 e. kl. 17

PEUGEOT TIL SØLU
Peugeot 406 2.0 HDI árg. 1999 til sølu fyri 120.000,- Koyrt 140.000 km.
Ring á tlf. 224984

BIL-ANLEGG TIL SØLU
Tveir forsterkarar, ein kondensator. JBL-subwoofari og2 JBL-GTi hátalarar. Phanasonic fløguspælari ið eisini spælir MP3, um hóskandi boð fæst.
Tlf. 254153

EIN VW CADDY
Ein WV Caddy 1,6 diesel pick-up til sølu, við nýggjum motori, sera økonomiskur. Til sølu fyri kr. 15000
Tlf. 220389

TIL SØLU
Renault Twingo 1,2 Autom. Gear. Sær gott út og koyrir væl. Nýsýnaður. Prísuppskot: 32.000 kr.
Tlf. 211662

BILSETUR TIL SØLU
2 spildurnýggj baksetur á 3 sitipláss biliga til sølu. Vælegnað til minni buss ella vøruvogn.
Tlf. 219325

HEILÁRSDEKK TIL SØLU
Góð, næstan óslitin á originalum Focus Ghia alufelgum. Stødd 195/60-15. Til sølu fyri kr. 3.000,-
Ring á tlf. 554508

BILANLEGG TIL SØLU
Pioneer anlegg, 2x MDS hátalarar, 200 watt við diskantum, 1x MDS forsterkari, 1x MDS bassur, 100 watt, til sølu fyri 10.000 kr. Nýprísur 18.000 kr. 1 ára gamalt.
Tlf. 263225

TOYOTA COROLLA AE 92
árg.89 til sølu, nýsýnaður, 4 píkadekk við felgum fylgja við. Søluprísur 6.000 kr.
Tlf. 261242/452114

PORCHE 92854
árg. 91, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 211641 ella 311641

TIL SØLU
Toyota Hilux 4x4 til sølu.
Tlf. 224340

BILUR TIL SØLU
Volvo FLM7, árg. 2000, koyrt 110.000 km, 230 hestar, við kabasju og lift, ið kann lyfta 2 tons. Síðulast kann opnast, vilurin tekur 20 fót konteynara. Vognurin sum tekur 20 fót konteynara fylgir eisini við.
Tlf. 272163

SUZUKI SWIFT 1.6
Árg. 1990-91, km. 165.000, nýsýnaður. Prísur 15.000. Skal síggjast. Nýggir reservadeilir til bilar eru til sølu.
Tlf. 522049 ella 322049

15'' SPORTFELGUR
Við góðum heilársdekkum, stødd 195/65-15. Passa til Honda Accord til sølu.
Tlf. 219300

MAZDA 323
Árg. 1987 til sølu. Prísuppskot kr. 60.000.
Tlf. 256142

DIESEL JEEPUR TIL SØLU
KIA Sportage, árg, 98, í góðum standi. kr. 60.000.
Tlf. 220615

TOYOTA AVENSIS TIL SØLU
ÁRg. 98, hvítur, sær sera gott úr.
Tlf. 441191 ella 252230

TIL SØLU
Silvurgráur Toyota Corolla við 16cc bensinmotori, árg. 1994, 5 sportfelgur fylgja við.
Tlf. 449251 ella 269653

TAKBOKS
Hevur nakar eina takboks at selja okkum. Ringi vinarliga
Tlf. 321702 ella 582976

TIL SØLU
Heilársdekk 165/70-13 brúkt í 1 mánad. Eru á felgu sum passar til Opel Astra. Til sølu kr.1500
Tlf. 318283 - 223982

TIL SØLU
Píkadekk 185/65/15 til BMW á sportfelgum til sølu.
Tlf. 228266

MAZDA 323
1500 cc, árg. 97, til sølu. Bilurin er í sera góðum standi og væl røktur. Sýnaður í mai 2004. Við í keypinum eru fýra so at siga nýggj heilársdekk á felgum. Prísuppskot 55.000 kr. john.berg@skulin.fo
Tlf. 375291, 263091 ella 254110

TIL SØLU
Saab 5.5 við skaða, árg. 98, koyrt uml. 58.000 km, verður seldur fyri 18.000 kr.
Tlf. 583388 ella 580474

FORD ESCORT TIL SLUBBI
Vínreyður, árg. 95, 117.000 km. Nýsýnaður.
Tlf. 224485

BILUR TIL SØLU
Ford Fiesta 1.8 diesel. árg. 1997. synet nov. 2003. velholdt medfølgende 4 pig-dæk. sælges pga flytning til omkr. 39.500,-. ring efter kl. 1600 på
Tlf 223042

TIL FORD SIERRA
Forlygtir,baklygtir,blunkljós framman og ein kølari til Ford Sierra 2.0 í árg. 1988 til sølu. Kann seljast samlað fyri kr. 700,- ella hvør sær.
Tel. 441097 ella 211097

NISSAN PRIMERA 1.8I
122 HK, árg. 01, gráur í sera góðum standi, til sølu.
Tlf. 373417 ella 211816

TOYOTA CAMRY 2.0I
Árg. 89 til sølu fyri 10.000 kr. Eitt gitt Pioneer anlegg fylgir við í prísinum. Áhugaðir kunnu ringja á
Tlf. 455711

TIL SØLU
Yamaha Virago 535 (svørt) árgangur 93. Ringi
Tlf. 317470

TIL SØLU
Sportfelgur til VW við dekkum 185/60 R14. Kann brúkast til aðrar bílar. Prísuppskot 1ø500 kr. Ring
Tlf. 263733

VEGNA SERLIGA UMSTØDUR
Selist ein nýggjur KIA Carneval við avslátri. Er á heimasíðuni www.dbbilar.fo.
Tlf. 251235 Hergeir

TOYOTA COROLLA 1,1 TIL SØLU
typa ae92, árg.88-90 skal til umsýn, ca. kr. 4.000,-
Tlf. 228347

Amboð

SLÁIMASKINA
Ein Tielburger sláimaskina, 5 HK til sølu.
Tlf. 503249

ÚTLEIGAN
av minigravimaskinu við ella uttan førara.
Tlf. 217507

TIL SØLU
Snikkaramaskina, 5 funktiónir, høvulin 35 cm.
Tlf. 456365 ella 756365

ÚTLEIGUAMBOÐ
Gravimaskina, luftkompressarir, lessumaskinur, stillas, forskallingar og mangt annað.
Tlf. 315600,
Kaj Andreasen & Co

Arbeiði

SØKT VERÐUR EFTIR
4 útlærdum málarum ið kunnu arbeiða saman til størri arbeiði í DK, góð løn.
Tlf. 273238

UTTANDURA MÁLING
Vit kunnu átaka okkum nakað av málingaarbeiði afturat í summar fyri sámuligar prísir.
Tlf. 721210

ER TAÐ NAKAR
sum hevur tíð at royta gras úr túninum hjá mær, so ring
tlf. 444009

AU-PAIR Í REYKJAVÍK
Familja við tveimum børnum vil fegin hava au-pair í 6-12 mánaðir. Má ikki roykja. Tey ið hava áhuga kunnu hitta familjuna í Føroyum til viðtalu t.d. tann 26. juli. Vinarliga ringið
tlf. 311589 ella 00 354 8979834

TILBOÐ
Uppá at sláa og klippa græsplenu, rudda rabarbur burtur og sera nógv ókrút at beina fyri. Skriva til Sosialurin. Box 76, 110 Tórshavn
Bill. mrk. 1872/12

TILBOÐ YNSKIST
Tilboð ynskist uppá stoyping av garagu og útgrevstur/planering.
Tlf. 333355 ella 210355

FÁ TAKIÐ MÁLAÐ ÁÐRENN ÓLAVSØKU
Um tit ynskja at fáa takið málað, so ring og fá eitt gott tilboð. Eisini verður givið tilboð uppá klædning og vindeygu. Vit hoyrast á
tlf. 227638

Barnaansing

ANSINGARPLÁSS
AnsingarplássÁlítandi kona ella genta søkist at ansa eftir eitt ára gomlum tvíburðum (genta og drongur) at byrja um hálvan august. Ansingin, tríggjar ella fýra dagar um vikuna, kann fara fram í heiminum ella hjá ansingarmammuni.
Tlf: 221241 ella 315046

Barnaútgerð

TIL SØLU
Óbrúkt babylift og puslitaska til sølu fyri 350 kr.
Tlf. 256517

RENNIVOGNUR
Rennivognur v/lift til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 256517

KALESJUVOGNUR
Kalesjuklapvognur til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 256517

TIL SØLU
Ein Silvercross barnavognur til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 264909

TVÍBURAKLAPPSTÓLUR
til sølu fyri 1.500 kr.
Tlf. 264909

TIL SØLU
Eitt pusliborð við baðikar til sølu fyri 500 kr.
Tlkf. 264909

BRIO KLAPVOGNUR TIL SØLU
er so gott sum nýggjur, verður seldur fyri einans 2.000 kr.
Tlf. 263835

BARNASTÓLUR
Svartur Simo by Bertini stólur v/ posa, selumo g regnslag til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 322047/504053

BARNAVOGNUR TIL SØLU
Lítið brúktur 1 ára gamal svartur Trille Gigant barnavognur til sølu fyri 4.500 kr. við lift, tasku, flugunet, regnslag og selum. Nýprísum uml. 7.000,-
Ring 513608

TIL SØLU
Trappuportur av stál. Kann innstillast. Við barnasikring og hurð. 300 kr.
Tlf. 252829

TREMMUSONG
Til sølu. Við madrassu, dýnu og kodda og tilhoyri fyri 300 kr.
Tlf. 317362

SIMOBARNAVOGNUR
Við lift, dýnu, kodda, fluguneti og regnslag til sølu.
Tlf. 316436

MYRKABLAÚR TVÍBURÐASTÓLUR
Til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 319296

TIL SØLU
Ein silvercross vognur við madrassu og selum til sølu fyri 700 kr, ein stólur fyri 500 kr.og ein bilstólur 0-18 kg 250 kr.
Tlf. 457871 ella 222042

EIN 2 ÁRA GAMAL SVARTUR
Ein 3 ára gamal svartur Simo kombivognur við koyriposa, regnslagi og fluguneti til sølu fyri hálvan prís: 3.200 krónur, tlf. 457871/222042
Tlf. 457871 ella 222042

YNSKIST
1 ella 2 trappuportur at spenna sundur
Tlf. 722036

Bátaútgerð

TIL SØLU
21 fót glastrevjabátur »Albin Snekken« við 24 HK Buck motori.
Tlf. 221744/ 217846

TIL SØLU
14 tons útróðrarbátur í góðum standi og væl útgjørdur, biliga til sølu. Báturin hevur rætt til bankaloyvi.
Tlf. 333062/ 223088

TIL SØLU
Ein heilautomatisk BJ5000 snella til sølu.
Tlf. 313285

GAMAL
Sabb motorur 8 HK, er í ólagi, fæst við at avheinta hann.
Tlf. 253896

TIL SØLU
8-mannafar úr Kaldbak, 40 HK, Thornycroft og Prm gear, radar, ekkolodd, GPS, presending, við ella uttan fiskiloyvi.
Tlf. 421222 ella 210822

PÁHANGSMOTORUR
Ein Yamaha páhangsmotorur 8 HK er sum nýggjur, árg 02 brúktur max 10 tímar, ynskist í býti við størri helst nýggjari 15 HK. max.
Tlf. 252829

YNSKIST
2 góðar hondsnellur ynskjast til keyps.
Tlf. 252829

ER TAÐ NAKAR
ið eigur eitt gear til sølu, 31 HK at selja mær.
Tlf. 256523

SØRLANDSJEKTE
Norskbygd, 24 fót úr eik, furu og mahogny. Er frammbygd og hevur kalesju aftan. 18-22 hesta Yanmar. Boð undir 50.000 kr ongan áhuga.
Tlf. 210753

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

- ❑ Akfør
- ❑ Barnaansing
- ❑ Bingo
- ❑ Býli
- ❑ Dýr
- ❑ Innbúgv
- ❑ Matur
- ❑ Súklur
- ❑ Út-& sjónvarp
- ❑ Amboð
- ❑ Barnaútgerð
- ❑ Brævaskifti
- ❑ Bøkur
- ❑ Fundir
- ❑ Lutaseðlar
- ❑ Pløgg
- ❑ Teldur
- ❑ Ymiskt
- ❑ Arbeiði
- ❑ Bátaútgerð
- ❑ Burturm./funnið
- ❑ Dansur
- ❑ Húsarhaldstól
- ❑ Leikur
- ❑ Samband
- ❑ Tónleikur
- ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12[00], t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar. Sosialurin tekur ongan ábyrgd av møguligum villum.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……...

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki

STARLETT 26 TIL SØLU
V/fiskiloyvi, Volvo Penta, 78 HK, árg. 2001, línuspæl, 4 snellur, radara, sjálvstýrara, 2 ekkolodd, VHF, plottara.
Tlf. 422141 ella 517413

Bingo

BINGO Í PÁLSSTOVU
sunnudagin 25. juli kl. 16. Gávukort til øll spølini, 75-150-500 kr. Á lutaseðli 10 x 100 kr. 2 x 500 kr. og 3 x 1000 kr. Bingola, eykaspæl, koyring heim.
Kiwanisfelagið Rósan

BINGO
verður í Stórhúshøll í Fuglafirði leygarkvøldið 24. juli kl. 19.00.
Eldrafelagið Borgin

GOTT BINGO
Gott ólavsøkubingo verður í Pálsstovu mánadagin 26. juli, kl. 19. Nógvir góðir vinningar.
Astma- og Allergifelagið

SUÐUROYINGAR
Gott bingo verður í Framtíðini mánadagin 16. august kl. 19. Nærri lýst seinni.
Kirkjukórið Ljómur

TVØROYRAR KLUBBI
Gott bingo verður í Tvøroyrar Klubba tórsdagin 22. juli kl. 19.00. Á lutaseðli ein Apex-ferðaseðil til Danmarkar.
Nevndin

KAGGIN
Gott ólavsøkubingo verður leygarkvøldið 24. juli 2004. kl. 20.00. 6. og 12. spæl gávukort á 1.000 kr. Burturlutað verður 5 gávukort á 500 kr. og 10 á 1.000 kr. Eisini verður spælt bingola og 20 kr. spæl. Moguleiki er at spæla gullbinga 21 og Dannebrog-spæl. Góða ólavsøku.
Kaggin

GOTT BINGO
Verður í Eydnuni sunnudagin kl. 16.00. At vinna gávukort frá Smyril Line. Eykaspæli 1.400 kr.
Eydnan

HEY HEY
Nú fara vit at hava loppumarknað í Glæmuni í Kvívík leygardagin 14. august 2004. Tey, ið vilja lata okkurt til loppumarknaðin, kunnu ringja á tlf. Lydia 212442, Beinta 721680 ella Ann 257165.
KSR, Glæman-skótarnir í Kvívík

Bøkur

GRIMBERG
Verdens Historie 16 bind, til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 322942

ALT TIL FHS
Allar bøkur til FHS á Handilsskúlanum til sølu fyri 1/2 prís, 1500 kr. Tilsamans, alt selist saman. Ring áðrenn 25. juli.
Tlf. 316337 eftir kl. 17

LADEMANNS LEKSIKON 1-22
Lademanns Dyreleksikon 1-18 Færøsk Anthologi 1 og 2 J. Símun Hansen Havið og vit. Til sølu.
Tlf. 267061

Burturm. /funnið

SÚKKLA MÍN
ein reyð »Monark« hvarv fyri umleið 2 mánaðum síðani. Hon stóð aftanfyri Statoil í Gundadali.
Tlf. 268088/315798

SONY ERICSSOn T610
Ein grá Sony Ericsson T610 er mist burtur á Gøtusandi á G-Festivalinum friggjakvøldið. Tann ið finnur hana, verður vinarliga biðin at ringja
tlf. 224673

Á G-FESTIVALINUM
friggjakvøldið misti eg ein svartan ryggsekk við pungi, kamera, brillum o.s.fr. Um tú av misgáum hevur tikið hann, vinarliga ring
tlf. 312648

HILSTUR BURTURMIST
Í Eclips - Klubbagarðinum leygarkvøldið 10. juli við koyrikorti, FR-korti o.a. Um nakar veit um tað, vinarliga ring
Tlf. 210584 ella 217267

Bústaðarveiðan

Fyri nakrar av kundum okkara sóknast vit eftir sethúsum og grundøkjum, sum lúka niðan fyri nevndu ynskjum. Um tygum halda, at hetta svarar til ogn tygara, sum ætlanin er at selja, so set tygum í samband við okkum – møguliga hava vit rætta keyparan.
Vit átaka okkum at selja fasta ogn um alt landið.

Nr. 945
Stað: Tórshavn-Argir
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Uml. 120 m²
Ynskir: Hús í einari hædd, helst 3 kømur
Kostnaður: Mesti kostnaður 1.300.000,-

Nr. 946
Stað: Tórshavn (helst nær miðbýnum)
Slag av veiðu: Grundøki
Stødd: 200 m²-400 m²
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 400.000,-

Nr. 947
Stað: Kvívík
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Uml. 80-90 m²
Ynskir: Alt hevur áhuga
Kostnaður: Mesti kostnaður 800.000,-

Nr. 948
Stað: Tórshavnar kommuna
Slag av veiðu: Sethús, tvíhús ella íbúð
Stødd: Alt hevur áhuga
Ynskir: 2-3 kømur
Kostnaður: Mesti kostnaður 800.000,-

Nr. 949
Stað: Gøta, Leirvík, Søldarfjørð, Skálafjørð, Skipanes
Slag av veiðu: Sethús, tvíhús ella íbúð
Stødd: 40-80 m²
Ynskir: 3 kømur
Kostnaður: Mesti kostnaður 500.000,-

Nr. 950
Stað: Tórshavn
Slag av veiðu: Sethús við kjallara
Stødd: Alt hevur áhuga
Ynskir: 3 kømur
Kostnaður: Mesti kostnaður 1.000.000,- (møguliga í býti við onnur hús)

Nr. 951
Stað: Tórshavn, helst nær Hoyvíkshaganum
Slag av veiðu: Sethús ella tvíhús
Stødd: Uml. 130-150 m²
Ynskir: 4 kømur og ikki eldri enn 1970
Kostnaður: Mesti kostnaður 1.400.000,-

Nr. 952
Stað: Hoyvík, Tórshavn, Argir
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Uml. 120 m²
Ynskir: Max. 15 ár
Kostnaður: Mesti kostnaður 1.600.000,-

Nr. 953
Stað: Hoyvík, Tórshavn, Argir
Slag av veiðu: Grundøki
Stødd: Minst 300 m²
Kostnaður: Mesti kostnaður 500.000,-

Nr. 954
Stað: Tórshavn
Slag av veiðu: Grundøki
Stødd: Uml. 400-500 m²
Kostnaður: Mesti kostnaður 450.000,-

Nr. 955
Stað: Suðurstreymoy
Slag av veiðu: Traðarstykki
Stødd: Alt hevur áhuga
Kostnaður: Uml. kr. 100,- pr. m²

Húsamekling

Sp/f Protek, Vaglið, Postsmoga 331, 110 Tórshavn,
Tlf. 319321, Fax 319331, E-mail: protek@post.olivant.fo
www.husamekling.fo
Avgreiðsla kl. 9-12 og 13-16
Keyp og søla av fastari ogn

LEÐURHANDSKI MISTUR
Eg misti ein av mínum leðurhandskum úti í Havnardali í síðstu viku. Um nakar hevur funnið hann, so vinarlig ring
Tlf. 513940

FUNNIÐ
Ein Siemens A55 fartelefin funnin 11. juli 2004 við gamla kirkjugarð í Tórshavn - nær við Kaggan. Ring
509266

BURTURMIST
Fartelefon Siemens S45, silvur/grá, burturmist 10. juli. Møguliga í Klubbagarðinum. Vinarliga ring
Tlf. 312048

BURTURMIST BELTASPENNI TIL GENTUBÚNAN
Enn einaferð sóknast vit eftir beltaspenninum við føroyskum knappum (6x6 knappar), ið hvarv á Ólavsøku 2003. Veit nakar um spenni, vinarliga ringi
Tlf. 312176 ella 273161

Býli

ÍBÚÐ SØKIST
Vit eru eitt ungt, friðarligt par, ið søkja íbúð í Havn. Bæði hava fast starv, fara væl um og gjalda rættstundis.
Tlf. 224211

MØBLERAÐ ÍBÚÐ
við altan á 65 fermetrar vid 2 rúmum mitt í Keypmannahavn (Solbakken) til leigu í tíðarskeiðnum 1. august til 7.august. Prísur fyri náttina: kr. 200. Vinarliga ringið +45 33249305, 22393279 ella 28129947
Tlf. +45 33249305, 22393279 ella 28129947

GOTT KAMAR
til leigu, til fólk ið ikki roykir ella drekkur. Atgongd til bað og vaskirúm.
Tlf. 217300

SETHÚS Í KLAKSVÍK TIL SØLU
Sethús á Skáltavegi 55 til sølu um hóskandi boð fæst. Húsini eru í tveimum hæddum, 85 fermetrar hvør hæddin.
Ring 456048 ella 221047

ÍBÚÐ YNSKIST Í HAVN
Vit eru 2 gentir, ið mangla eitt stað at búgva. Vit fara væl um, gjalda til tíðina og báðar hava fast starv.
Tlf. 250717

ÍBÚÐ YNSKIST
tilleigu í Havn skjótast gjørligt.
Tlf. 251055

ÍBÚÐ Í ODENSE
Íbúð tilleigui Odense centrum (H. C. Andersen umráðnum) 2 ver. ca. 60 fermetrar fyri 1.500 fyri vikuna frá 24. juli til 24. august.
Tlf. 581442 ella 221904

GÓÐ HÚS Á BYGD
til leigu í longri ella styttri tíðarskeið.
Tlf. 508878

TIL LEIGU Á ÓLAVSØKU
45 fermetrar ómøblerað íbúð til leigu til friðarlig fólk.
Tlf. 218664

ÍBÚÐ SØKIST
Lesandi søkir íbúð í Tórshavn skjótast gjørligt. t-postur: olavure@post.olivant.fo
Tlf. 222661/361041/321383

KEYPMANNAHAVN!
Stórt møblerað kamar til leigu á Amager frá 1. august 2004. Atgongd til køk og bað, tætt við strond og gott bussamband til centrum. Til leigu fyri 2.500 kr. pr. mðr.
Tlf. +45 27206866

HØLIR Í HOYVÍK TIL SØLU
Hølini eru uml. 100 fermetrar og møguleiki at víðka til uml. 200 fermetrar. Vælegnað til skrivstovu, ráðgevingarvirksemi o.a. Gott útsýni og tætt til busssamband.
Tlf. 215609

HALDI FRÍ Í RUNAVÍK
Góð íbúð 50 ferðmetrar við øllum hentleikum í hugnaligum umhvørvi til leigu.
Tlf. 447451

HÚS Á MARKNOYRI Í VÁGI
til sølu, umnóg høgt boð fæst.
Tlf. 373625 - 573625

LÍTIL ÍBÚÐ
Lítil íbúð í Brønshøj til leigu í tíðarskeiðinum umleið 27. juli til 31. aug. Møguliga longri. Gott bussamband umleið 3. hvønn min.
Tlf. 317724/258833

ÍBÚÐ TIL LEIGU Í HAVN
2 kømur, alrúm og baðirum 5.200 við varma frá 1. august 04.v
Tlf. 316022/252922

SØKT VERÐUR
eftir húsum at leiga frá 1. august 2004 ella 15. aug. Roykja og drekka ikki. Best eftir kl. 18.
Tlf. 213395

KAMAR TIL LEIGU
í Vesturbýnum við atgongd til køk, bað og vaskimaskinu, nær við Læraraskúlan.
Tlf. 221158/313799

KAMAR TIL LEIGU
Í miðbýnum í Havn er eitt kamar til leigu fyri 2.000,- kr. um mánaðin 1.000,- kr. í depositum.
Tlf. 509253

ÍBÚÐ YNSKIST
Einlig mamma við einum barni søkir íbúð ella hús til leigu í Tórshavn/Hoyvík. Fara væl um og gjalda til tíðina. Vinarliga ring
tlf. 508377

ÍBÚÐ YNSKIST Í KLAKSVÍK
3 ungar lesandi gentur søkja íbúð í Klaksvík fyri sámuligan prís.
Vinarliga ring 252731

ÍBÚÐ TIL LEIGU
Uml. 45 fermetrar við el og hita. 4.500 kr. um mánaðin. Einans egna til einligan persón.
Tlf. 218664

YBÚÐ YNSIST
Ung genta, ið skal byrja í læru hálvan august, ynskir íbúð fyri sámuligan prís. Eg eri friðarlig, fari væl um og gjaldi til tíðina. Um tú fært hjálpt mær, so vinarliga ring á
Tlf. 250955 ella 423214

KAMAR YNSKIST
Ung genta, ið skal byrja í læru hálvan august ynskir kamar. Eri friðarlig, fari væl um og gjaldi til tíðina. Vinarliga ring á
Tlf 250955 ella 423214

HÚS TIL SOLU
Sethús mitt í Tórshavn til sølu um hóskandi boð fæst. Grundøki 351. Búareal uml. 150 í tveimum hæddum. byggiár: 1995.
Tlf. 320215 eftir kl. 17

ÍBÚÐ Í KBH
Íbúð til leigu í tíðarskeiðnum 23. juli til 30. sept. Gott buss- og toksamband.
Tlf. 510818

SUMMARFRÍ
Í København/Roskilde. Er onkur sum kann leiga mær eina íbúð í KBH/Roskilde ella nærindis frá uml. 7.august til 15. august. Eg fari væl um. E-post.olselsba@hotmail.com ella ringi
Tlf. 313372 ella 226692

HÚS Í LÍÐINI OG Á TVØROYRI
Eru til leigu í vikuskiftum og stytri tíð. Vanligir hentleikar eru í húsunum.
Tlf. 371659 ella 222684

VIT ERU EITT FRIÐARLIGT PAR
Sum søkir íbúð í høvuðsstaðarumráðnum. Roykja og drekka ikki. Fara væl um og gjalda til tíðina. Um hetta vekir tín áhuga, vinarliga ring
Tlf. 224467 ella 228925

GRUNDSTYKKU
Planera grundstykki á Svínánesi í Svínáum til sølu um hóskandi boð fæst
Tel. 423287 / 216287

ÍBÚÐ Á ARGJUM TIL LEIGU
2 kømur, køkur, stova, bað og kjallari til leigu beinanveg. Kostnaður 5.000 kr. Ein mánað depositum. Skrivi til Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn
Bill. mrk. 1876/8

ÁLÍTANDI KVINNA YNSKIR KAMAR
Helst hjá eldri fólki. Kann gera reint 1-2 ferðir um vikuna í staðin í august mánað. Helst í Havn.
Tlf. 259047

ÍBÚÐ YNSKIST TIL LEIGU Í HAVN
Til friðarligt par skjótast gjørligt. Hava fast arbeiði. Vinarliga ring
Tlf. 22251 ella 260543

HÚS Á GLYVRUM
Til leigu frá 1. aug.
Tlf. +45 21783141

SANSK PEDAGOG SØGER
En stor lejlighed eller hus til leje i Torshavn fra medium august. Venligst Dorthe R. Nielsen, Strandgade 4, 4760 Vordingborg
Tlf. +45 55346221

HÚS Á ÓLAVSØKU
Hevur tú eini hús sum vit kunnu leiga í 2 dagar. Tú fært 4.000 kr. Vit fara 100% væl um.
Tlf. 216500

ÍBÚÐ YNSKIST Í HAVN
Helst 2 kømur, fara væl um og gjalda til tíðina. Vinarliga ring
Tlf. 251055 ella 140717

KAMAR TIL LEIGU
Í Tórshavn.
Tlf. 223101

Dýr

HUNDAHVØLPAR
2 systrar latast til djóravin. Tær líkjast mammuni, sum er ein border collie/labrador og sera fitt.
Tlf. 515151

FITTUR SVARTBRÚNUR
frensur, 10 vikur gamal, undan angoramammu fæst við at ringja
tlf. 318786

SEYÐAHUNDAHVØLPAR TIL SØLU
Eru klárir at fara frá mammu síni.
Tlf. 421609/211609

DUNNUUNGAR
Nakrir dunnuungar, nakrir hønsarungar og 6 gásarungar til sølu.
Tlf. 441252/261983

TVEIR FITTIR KETTLINGAR
Ein gráur og hvítur, frensur, og ein svartur og hvítur, ketta, duga at eta og leppa og eru sera reinligir. Bert latnir djóravini.
Tlf. 422389 ella 265792

INNIBÚR
Til marsvín og kaninir til sølu fyri 400 kr. Nýprísur 695 kr. Er lítið brúkt, stødd l. 80 x br. 49 x h. 41 cm.
Tlf. 229807

MARSVÍNUNGU
Fittur marsvínungi fæst við at ringja
Tlf. 321702 ella 582976

TIL SØLU
Hitalikam til akvarium fæst bíliga.
Tlf. 583388

BORDERCOLLIE
Seyðahundahvølpar til sølu.
Tlf. 421024

KETTLINGUR
Sera fittur kettlingur (ketta), svartur, 10 vikur gamal, verður latin til onkran sum kenn verða ordliga góður við hann. Ring
Tlf. 317676